## Heimsins dýrasta

Brad Pitt og Angelina Jolie seta aftur nýtt met fyri, hvat ein mynd kann kosta. Rættindini at vísa fyrstu myndirnar av tvíburunum hjá teimum báðum, Vivienne Marcheline og Knox Leon, keyptu enska Hello! Magazine og amerikanska People Magazine. Prísurin gjørdist heilar 14 milliónir dollarar (umleið 67 milliónir krónur), og tað er met fyri myndir at slíkum slag. At prísurin gjørdist so høgur kemst av, at bæði Hello! Magazine og OK! Magazine vildu hava fatur í myndunum og yvirbjóðaðu hvørt annað fleiri ferðir.




## Visti einki

69-ára gamla konan til illa gitna Josef Fritzl hevði ikki ánilsi av, at maður hennara hevði dóttrina, Elisabeth, sum fanga í kjallaranum í 24 ár. Tað sigur hon í fyrstu samrøðuni eftir at tað kom fram. Sambært Rosemarie Fritzl livdu tey hvør sítt lív, hon uppi á og hann niðri undir. Tað var eisini orsøkin til, at hon einki visti um ræðslukjallaran, har maðurin hevði dóttrina fangaða í øll tey mongu árini, og har hann fekk sjey børn við henni.

# Betongbilur koppaði í Fámjin

**Tveir kranabilar máttu til fyri at fáa ein stóran betongbil fullan av betong upp á slætt aftur í Fámjin hósdagin**

ÓHAPP
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hósdagin var stórhending í lítlari bygd, tá ein stórur betonbilur koppaði útav smala vegnum til Fámjin. Og tað var ikki bara sum at siga tað, at fáa hann upp aftur. Tveir kranabilar úr ávikavist Vági og Lopra vórðu boðsendir og stríddust í fleiri tímar, fyri at fáa bilin upp á rættkjøl aftur.

31 ára gamli førarin, sum ikki er vanur at koyra við stóra betongbilinum eftir smala bygdavegnum oman í bygdina, fekk tíbetur onki mein, tá bilurin knappliga kom ov langt út á kantin og koppaði. Men bilurin er helst vrak, sigur stjórin í Suður-Betong í Vági, Eyðstein Lyngvej, við Sosialin.

- Hetta var held í óheld. Koppaði bilurin longri uppi, har høgt er omanav, spurdust hvørki bilur ella maður aftur, sigur stjórin á virkinum.

Tað var annar av tveimum betongbilum hjá Suður-Betong, sum fór so illa. Eyðstein Lyngvej hevði júst bílagt ein nýggjan bil úr Danmark, tá óhappið hendi, og ætlanin var at selja gamla bilin. Hetta verður nú av ongum, men vónandi tekur tryggingin við, sigur hann.





*Hósdagin koppaði annar av betongbilunum hjá Suður-Betong á smala bygdavegnum til Fámjin. Nógv fólk fylgdu við teir mongu tímarnar, tað tók at fáa bilin upp á rættkjøl aftur*

*Myndir: Talgilt*

# Fleiri koyrikort ruku

**Vikuskiftið var somikið friðarligt, at politiið fekk tíð at gera ferðamátingar. Millum annað var ein, sum koyrdi undan í Havnini við 120 km/t**

VAKTHAVANDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Lítið lív var í fólki hetta vikuskiftið, nú ólavsøkan er av á hesum sinni. Hetta mátti løgreglan sanna, tí har var millum lítið og onki at tríva í hjá teimum, sum vóru á vakt. Tí varð avrátt at brúka tíðina til ferðslumátingar av ymsum slag. Nú var fongur – onkur koyrikort ruku og eisini vórðu nøkur klipp latin.

Fríggjanáttina misti ein bilførari kortið treytaleyst. Og leygarmorgunin varð ein sprittbilistur tikin í Havn. Um somu tíð varð ein bilførari tikin vesturi í Vágum, tí hann hevði rent á eitt skelti. Báðir høvdu drukkið og kunnu rokna við at skula av við koyrikortið eina tíð.

### Koyrdi 120 í bygdum øki

Sunnumorgunin kom løgreglan fram á ein bilføra, sum koyrdi undan politinum allan vegin inn í Havnina og ígjøgnum býin. Maðurin koyrdi 160 í óbygdum og 120 í bygdum. Til endans tveitti hann bilin frá sær á parkeringsplássinum á Landssjúkrahúsinum, har hann varð handtikin. Maðurin hevði onki koyrikort og blóðroynd varð tikin av honum. Av tí at hann onki koyrikort hevði, fær hann eina bót fyri øll ferðslubrotini, sum hann gjørdi á vegnum.

Um sjeytiðina sunnukvøldið kom løgreglan fram á ein annan mann, sum frammanundan hevði frádømt koyrikort. Hann kemur inn at sita í eina viku.



*Sunnumorgunin kom løgreglan fram á ein bilførara, sum koyrdi 160 km/t í óbygdum og 120 í bygdum*